# Blindur er bókleysur maður!

**Væl av fólki vóru møtt í Mentamálaráðnum seinasta hósdag, tá ið skipað varð fyri framløgu av bókarøðini, Alis-og evnafrøði 1 til 3, nú triðja og seinasta bókin í røðini er liðug**

ALIS- OG EVNAFRØÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrstur at taka orðið í Mentamálaráðnum hendan dagin var Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum.

– Blindur er bókleysur maður! Soleiðis mæltu teir gomlu, og tíðin hevur ikki gjørt orðum teirra til skammar. Hóast kunnskapurin nú á døgum er stórur, og vitanin røkkur langt í hesum teldutøkniligu tíðum, so verður bókin alsamt eitt neyðugt undirvísingaramboð.

Jógvan vísti á, at tá ið gamli landslæknin, Hanus Debes Joensen, gav út bók, sum hann nevndi Alisfrøði, mundu tað vera mong, ið ikki skiltu týdningin av hesum heiti. Tá varð hetta øki vanliga kallað "fysikk".

– Tað hevur sera stóran týdning, at skúlabøkur eru skrivaðar á føroyskum, har greitt verður frá, hvussu tær alisfrøðiligu og evnafrøðiligu lógirnar og fyribrigdini gera seg galdandi í dagliga lívinum við støði í føroyskum náttúruumhvørvi – eisini, tá ið tað snýr seg um náttúrulærugreinarnar. Hetta er alisfrøðin hjá landslæknanum besta dømi um.

Landsstýrismaðurin helt fyri, at í dag er tað tíbetur so, at flest øll vita, hvat alisfrøði fevnir um



*– Hetta er eitt valaverk og eitt úrslit av góðum samstarvi, segði landsstýrismaðurin, Jógvan á Lakjuni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

– At kunna viðgera og læra um náttúrufyribrigdini á sínum egna máli, eigur avgjørt ikki at verða undirmett.

## Bjarni sáli

Jógvan segði, at ein av slóðbrótarunum at fáa føroyska málið inn í náttúrulærugreinarnar var Bjarni Niclasen, sáli. Hann skrivaði í 1963 læribókina, Evnafrøði og Alisfrøði I, II og III, sum vóru ætlaðar til frálæru í alisfrøði í framhaldsdeildini. Síðan eru fleiri lærubøkur komnar innan alisfrøðina, og tær



nýggjastu eru bøkurnar hjá Pól Jespersen, sum vit hava liggjandi her í dag, Alisfrøði og evnafrøði 1 til 3.

– Sigast má, at hetta er eitt valaverk og eitt úrslit av góðum samstarvi millum Mentamálaráðið, sum hevur útvegað handritið við at gjalda lønina hjá høvundanum, meðan Føroya Skúlabókagrunnur hevur lagt útgávuna til rættis, bæði innihaldsliga og tekniskt, umframt at Skúlabókagrunnurin hevur staðið fyri prentingini.

Jógvan segði, at høvundurin hevur havt donsku bøkurnar, "Ny fysik/kemi" sum fyrimynd og hevur týtt og lagað tilfarið til føroysk viðurskifti.

– Øll øki, ið verða viðgjørd, taka – har tað ber til, støði í tí, sum næmingarnir kenna og verða sett í eitt søguligt høpi. Henda skipan styrkir um læringina hjá næmingunum. Nógvar royndir eru knýttar at viðgerðini av evnunum, bæði felagsroyndir í lærubókini og ein serstøk arbeiðsbók við næmingaroyndum.

Jógvan á Lakjuni segði seg vóna, at tey, sum skulu nýta hesar bøkurnar, taka ímóti teimum - við opnum ørmum.

– Tøkk til rithøvundin, Pól Jespersen og øll hini, sum hava verið við og tøkk til Føroya Skúlabókagrunn, segði landsstýrismaðurin.

# Gott undirvísingartilfar er ein fyritreyt

**- Fremmant undirvísingartilfar til føroysk børn er ikki nøktandi. Vit kunnu siga, at hetta er irrelevant. At byggja á heimliga mentan, hevur eisini verið ein aðaltáttur í arbeiðinum við útgávuni av Alisfrøði og evnafrøði 1 til 3, og soleiðis er hópur av dømum úr Føroyum, segði Niels Petersen, ein av ritstjórunum**

ALIS- OG EVNAFRØÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Niels Petersen, sum er ein av ritstjórunum hjá Føroya Skúlabókagrunni, segði, at tað hevur verið eitt av teimum stóru tøkunum hjá grunninum at geva Alisfrøði og evnafrøði 1 til 3 út.

- Hetta hevur kravt nógva fíggjarorku og nógva arbeiðsorku hjá høvundi, teknarum, stuðulsbólki og tí, sum hevur rættlisið. Hetta hevur eisini kravt nógva orku hjá teimum, sum hava staðið fyri prenttilgerðini og hjá Skúlabókagrunnium sjálvum.

Hann segði, at Skúlabókagrunnurin visti, at tað stóð ikki væl til við alis- og evnafrøðini í skúlaverkinum.

– Hetta var ikki ein av teimum best umtóktu lærugreinunum, og støðan bara versnaði. Hetta var ein niðurgangandi "spiral", sum mátti vendast. Í samráð við Mentamálaráðið, fór Skúlabókagrunnurin tí undir útgávu av hesum verki.

Niels segði, at tey heittu á Pól Jespersen, studentaskúlalærara, sum áður hevur skrivað fleiri bøkur um alisfrøði, um at taka hetta arbeiði á seg. Samstundis varð settur ein



*- Í øllum framkomnum londum er støðið undir undirvísingini ikki bara móðurmálið, men eisini, at undirvísingartilfarið er bygt á heimliga grund, segði Niels Petersen, ein av ritstjórunum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

stuðulsbólkur, mannaður við royndum lærarum í alis- og evnafrøði í fólkaskúlanum.

– Við neyvari viðgerð og neyvum eftirliti skuldi bólkurin tryggja, at støðið og progressiónin í tilfarinum var hóskandi til hesi skúlaárini. Ein fyrimunur við hesi skipan var eisini, at tað bar til at raka støðið, har



# Ein mannarættur hjá børnunum at verða undirvíst á føroyskum

**- Tað eru føroyskir lærarar sum gera okkara undirvísingarmiðlar – og teir duga líka so væl sum lærarar aðrastaðni. Sum samfelag eiga vit at vera errin av tí, sum føroyskir lærarar hava fingið av skafti, tí tað er ikki smávegis, segði Helena Dam á Neystabø, leiðari á Føroya Skúlabókagrunni**

ALIS- OG EVNAFRØÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Tað er ikki so vanligt, at Føroya Skúlabókagrunnur ger so nógv burtur úr, tá ið verk koma út. Men tá ið vit saman við Mentamálaráðnum hava bjóðað tykkum øllum higar í dag, er tað fyri at takka teimum mongu, sum hava gjørt tað møguligt at fáa gott alis-og evnafrøðitilfar á føroyskum. Hetta tilfar kann verða



*- Sum samfelag eiga vit at vera errin av tí, sum føroyskir lærarar hava fingið av skafti, tí tað er ikki smávegis, segði Helena Dam á Neystabø*

við til at lyfta frálæruna í alis- og evnafrøði upp á eitt gott og høgt støði í fólkaskúlanum. Men hetta er eisini fyri at varpa ljós á spurningin, um vitan og útbúgving í fólkaskúlanum hevur tørv á einum móðurmáli og einum heimligum útgangsstøði. Til seinast, men ikki minst, er hetta fyri at skapa áhuga fyri eini lærugrein, sum tykist hava trupul kor, bæði í fólkaskúlanum og aðrastaðni í samfelagnum.

Hetta segði Helena Dam á Neystabø, leiðari á Føroya Skúlabókagrunni við framløguna av bókaverkinum, Alisfrøði og evnafrøði 1 til 3.

Hon vísti á, at tað, at bøkurnar nú eru á føroyskum, bara kann vera ein fyrimunur.

– Tað eigur at verða ein sjálvsagdur mannarættur hjá føroyskum børnum at verða undirvíst á sínum móðurmáli, tá ið hesin møguleiki er tøkur.

Hon segði, at tað er meginreglan í allari námsfrøði, at skúlin skal taka støði í umstøðunum hjá tí einstaka næminginum.

– Vitanin skal setast inn í eitt høpi, sum forklárar og gevur meining. Tað er út frá hesum grundsjónarmiði, at Skúlabókanevndin, sum er mannað við lærarum úr føroyska skúlaverkinum, tók ta avgerð, at nú skuldi hetta øki koma undir føroyskt mál og setast inn í ein samanhang, sum er viðkomandi fyri børn í fólkaskúlanum.

Helena segði, at tað er áskoðan Skúlabókagrunsins, at tað ber til at seta sær sum mál at nøkta tørvin á føroyskum undirvísingarmiðlum til fólkaskúlan.

– Leisturin verður í summum førum ein annar enn í londum, har skúlabókaframleiðsla er ein kommersiellur handilsligur ídnaður. Men fyri tann skuld nýtist tað ikki at vera verri.

Hon vísti á, at tað eru føroyskir lærarar sum gera okkara undirvísingarmiðlar – og teir duga líka so væl sum lærarar aðrastaðni.

– Sum samfelag eiga vit at vera errin av tí, sum føroyskir lærarar hava fingið av skafti, tí tað er ikki smávegis.

Helena reisti eisini spurningin, hvussu tað so er við ymiskum pedagogiskum sjónarmiðum?

– Skúlabókagrunnurin leggur stóran dent á, at lærarar varðveita sítt frælsi at velja frítt millum tøkt undirvíngartilfar, og at lærarar fáa frælsi at skriva sambært egnari sannføring. Tó eru bøkur yvirhøvur skipaðar so, at tað ber til at arbeiða við ymiskum pedagogiskum vinklum. Eingin bók kann einsamøll bera námsfrøðina inn í skúlastovuna. Tí kunnu vit fegnast um, at vit hava eina lærarastatt, sum er útbúgvin til at arbeiða við undirvísingini og undirvísingartilfarinum á ein tíðarhóskandi námsfrøðiligan hátt í neyvum samstarvi við næmingarnar.

At enda nýtti eisini Helena Dam á Neystabø høvi at takka øllum teimum, sum hava verið við til at gera útgávuna av hesum verki møguliga.

– Og nú eg eri farin undir at takka, vil eg takka Niels Petersen, sum hevur verið ritstjóri á Skúlabókagrunninum øll hesi árini og sum hevur tað áræði og treiskni, sum skal til, tá ið so stórar uppgávur skulu lyftast, segði hon.



*Óli Petersen er annar av teknarunum*



*Pól Jespersen, høvundur*

studentaskúlin byrjar við sínari undirvísing í alis- og evnafrøði.

Og ritstjórin helt fram:

Øll vita, hvønn týdning kunnleikin til alis- og evnafrøði hevur í einum hátøkniligum samfelag sum tí føroyska. Tí ræður um, at vit fylgja við á hesum øki og ikki gerast eftirbátur.

Niels segði, at bøkurnar eru á einum rættiliga høgum fakligum støði.

– Tað varð hildið vera rætt ikki at lora her, og tilfarið er so rúgvusmikið, at lærarin hevur nógvar valmøguleikar í síni undirvísing – ikki minst í teimum praktisku royndunum.

Hann segði, at í øllum framkomnum londum er støðið undir undirvísingini ikki bara móðurmálið, men eisini, at undirvísingartilfarið er bygt á heimliga grund. Ella sagt við øðrum orðum: At tilfarið tekur útgangsstøðið í tí samfelagi, sum børnini kenna.

– Hetta gerst heilt greitt ein av motivatiónunum til lærugreinina. Tí kann fremmant undirvísingartilfar til føroysk børn ikki vera nøktandi, og vit kunnu siga, at hetta er irrelevant. At byggja á heimliga mentan, hevur eisini verið ein aðaltáttur í arbeiðinum við útgávuni, og soleiðis er hópur av dømum úr Føroyum.

Niels helt, at lærarar eiga at fáa besta tilfarið, sum kann útvegast, og bókin ella tilfarið er støðið undir undirvísingini.

– Gott undirvísingartilfar er ein fyritreyt fyri góðari undirvísing, og sostatt eisini til gagns fyri næmingarnar.

Ritstjórin vísti á, at ein bók verður ikki ein skúlabók – bara tí hon verður nevnd skúlabók. Tað skal meira til enn so.

– Tí hevur Skúlabókagrunnurin sum mál, at bøkurnar fáa eina gjølliga fakliga, mánsliga og námsfrøðiliga viðgerð, og í hesum sambandi hevur grunnurin neyvt samstarv við hópin av lærarum, fakfólk og stovnar.

Niels Petersen nýtti eisini høvi at takka øllum teimum, sum hava tikið hond í við Alisfrøði og evnafrøði 1 til 3.

– Ikki minst fari eg at takka høvundanum, Pól Jespersen, fyri, at tú tók á teg hesa stóru uppgávu og fyri tað einastandandi ídni og góða samstarv, ið hevur verið øll hesi árini. Hetta er einki minni enn eitt bragd, segði ritstjórin at enda.